## DAGSINS MEINING

# Hjartaliga tillukku og góðan byr

Tað var nógv orðaskifti og harðar samráðingar, tá Havnar Arbeiðsmannafelag kravdi, at arbeiðsgevararnir skuldu eina krónu í ein eftirlønargrunn. Onnur fakfeløg vildu hava hesa krónuna upp á lønina. Men Havnar Arbeiðsmannafelag fekk sína vilja ígjøgnum, og við hesum varð grundarlag lagt fyri einum eftirlønargrunni.

Summi høvdu hug at smírast, men limirnir í arbeiðsmannafelagnum fegnaðaust, tá teir nøkur ár seinri fingu sína egnu eftirløn, sum var nøkurlunda tann sama sum fólkapensjónin. Harafturat hevur eftirlønarkassin kastað nógvan pening av sær til felagið, tí peningurin er læntur út, og rentuinntøkan hevur nørt um ognina, og tað gevur eisini styrki.

Eisini hildu summi, at tað var ikki rætt, at Havnar Arbeiðsmannafelag teknaði eina lívstrygging fyri limir sínar. Pengarnir áttu heldur at verið settir í ein vekfalsgrunn. Verkfalsgrunnar er eisini neyðugur í fakliga stríðnum, men ikki skerst burtur, at mong einkja og mong børn hava verið fegin fyri lívstryggingina, sum tey fingu eftir mannin ella pápan.

Sunnudagin vóru 25 ár liðin síðani Karl Johansen fyrstu ferð varð valdur til formann í Havnar Arbeiðsmannafelag. Og teir nevndu batar kunnu arbeiðsmenninir í Havn fyrst og fremst takka Karli Johansen fyri. Harafturat lótu hesir batar eyguni upp hjá øðrum fakfelagsfólkum, tí fólkapensjónin er ikki nóg mikið í dag, og verður tað valla í framtíðini. Síðani hava onnur fakfeløg fingið sínar eftirlønargrunnar. Men hesir skipaðir á tann hátt, at limirnir fáa eina eftirløn, sum svarar til inngjaldið. Grunnurin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag er afturímóti ein samhaldsfastur grunnur, og eftir hesi skipan fáa allir limir ta somu eftirlønina, líka mikið, hvussu nógv teir hava goldið inn.

Tað er ikki hvørs mans føri at standa á odda í fakliga stríðnum eina fjórðingsøld. Men nú kemur Karl upp í liðið saman við Óla Jacobsen, meðan tað enn resta nøkur ár í hjá einum øðrum markantum fakfelagsleiðara, Ingeborg Vinther. Fakliga arbeiðið er fjølbroytt og ymiskt frá felag til felag. Í síni tíð snúði tað seg fyrst og fremst at fáa nøkur oyru upp á krónuna, men so ásannaðu teir tilvitandi oddamenninir, at fakliga stríðið er eitt stríð fyri sosialum rættvísi, og uttan politiska ávirkan ber ikki til at røkka teimum stóru samfelagsligu málunum. Teir tóku seg tí saman at stovna ein politiskan flokk, og í samstarvi eru nógv mál rokkin - mál sum í dag eru sjálvfylgjur fyri tey yngru ættarliðini.

Tá Karl Johansen fekk sín elddóp í sáttmálasamráðingum, var tað saman við m.a. Andreu Árting - ein legenda í føroyskari fakfelagsrørslu - sum eftir hesar samráðingar rósti tí unga Karl. Hetta var í 1977, og ta ferðina eydnaðist tað fáa arbeiðskvinnunum somu løn, sum menninir fingu. So næsta ár eru 25 ár síðani hesin sigurin varð vunnin í samband við javnrættindi og rættvísi.

Hóast hesi framstig, skerst ikki burtur, at arbeiðslønin er ov lág í mun til kostnaðarstigið í landinum. Tíverri tykist lønarójavnin at økjast. Tað merkir, at í hesum tíðum eru stór tøk at taka hjá arbeiðrafeløgunum. Karl, Ingeborg og øll hini hava tí stórar avbjóðingar fyri framman. Men við hesum ynskja við Karl Johansen tillukku við 25 ára degnum sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag og ynskja honum og felagnum góðan byr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Peningurin ikki farin til sjúklingin

**Jákup Petersen**
*yvirlækni á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar Sjúkrahúsi*



Skelkandi at lesa leiðaran í Sosialinum í dag. Farið verður nú aftur í gomlu skotgravirnar. Roynt verður nú aftur at lasta smáu sjúkrahúsunum fyri, at tað ikki gongur so væl á Landssjúkrahúsinum. Roynt verður nú aftur at seta sjúkrahúsini upp móti hvørjum øðrum. Hetta hava vit annars roynt at mana í jørðina fyri at fáa sjúkrahúsverkið at hanga saman.

Lat meg spyrja beinanvegin. Nær var tað seinast, at tað gekk væl á Landssjúkrahúsinum? Nær hoyrdu vit seinast frá Landssjúkrahúsinum, at nú vóru ongi fólk søgd upp, at nú høvdu ongi fólk sagt upp ella, at onki verkfall var.

Nú arbeiði eg sjálvur bæði á Landssjúkrahúsinum og á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og síggi trupulleikarnar á báðum støðunum, men eg kann ikki siga nakað um Suðuroyar Sjúkrahús.

Landssjúkrahúsið hevur síðani kreppuna fingið ment seg upp á ta gomlu játtanina. Hetta vil siga, at Landssjúkrahúsið seinastu 10 árini hevur fingið 32 milliónir kr. upp á játtanina, sum er tað sama sum alt Suðuroyar Sjúkrahús kostar. Klaksvíkar Sjúkrahús hevur bert fingið helvtina aftur av tí tað misti.

Landssjúkrahúsið hevur seinastu 10 árini fingið umleið 200 mill. kr. til íløgur meðan Klaksvíkar Sjúkrahús ikki hevur fingið eina krónu. Tann seinasta útbyggingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi liggur 15 ár aftur í tíðini og var ein skurðstova. Sjálvt sjúkrahúsið er 40 ára gamalt.

Tey smáu sjúkrahúsini hava seinastu árini ikki fingið tað sum líkist av hjálp til at manna tey við neyðugum starvsfólki.

Nei, áðrenn farið verður alt ov brádliga í blekkhúsið, vildi eg rátt til at tit kannaðu viðurskiftini eitt sindur óheft, og ikki bert gera tykkum meiningar, alt eftir hvat fólk í høvuðsstaðnum hava at siga tykkum.

Áðrenn tit smildra tað samarbeiði niður, sum vit í fleiri ár hava bygt upp, vil eg mæla til, at tit kunna tykkum eitt sindur óheft.

Og áðrenn tit enn einaferð leggja eftir teimum smáu sjúkrahúsinum, haldi eg, at tit í minsta lagi áttu at spurt tykkum eitt sindur fyri á teimum smáu sjúkrahúsunum.

Man tað ikki vera sannleikanum eitt sindur nærri, tá eg pástandi at peningurin til heilsuverkið seinastu árini í stóran mun er farin til leiðsluskipanir og minni til sjúklingin, og at tey viknaðu smáu sjúkrahúsini senda alt fleiri sjúklingar til Landssjúkrahúsið.

Við vón um arbeiðsfrið og góð jól.

# Um ferðamannskipið Teistan á morgni

**Sólvit Simonsen**



Eg havi sjálvur verið við at brúkt »Súluna« til sigling um Skúvoyarfjørð, og ikki bara haldi, men veit, at hon er væl brúkandi til sigling millum Gomlurætt og Hest. Men tá nú tað almenna hevur brúkt so nógvar pengar úti í Hesti at tað má verða »Teistin«, ið siglir á morgni, so havi eg hetta uppskot:

Tilkalling altíð kvøldið fyri áðrenn kl. 22.00 frá mánadegi til og við fríggjadag.
Kl. 6.15 Skopun-Hest-Skopun
Kl. 7.05 Skopun-Gamlarætt

Hetta er nakað tyngjandi fyri manningina, men tá ið tað ikki gerst øðrvísi, so má tað bara vera so. Tá eiga sandoyingar betri tíð heima og stytri bíðitíð á Gomlurætt viðvíkjandi bussi.

Tað er hóast alt munur á fólkatalinum í Hesti og í Sandoynni. Tað eru umstøður hjá skúlaungdómi og arbeiðsfólk, tað ræður um.

Til Gerhard Lognberg og Eyðun Viderø vil eg siga: Hugsið væl um umdómin bæði so og so, um trivnaður skal vera og Sandoynni lív lagað.

# Tankar eftir konsertina í Vesturkirkjuni

**Sjúrður Hammer**
*Gøtu*

Tú, hvussu ofta sang Eivør (Pálsdóttir) í grundini í hesum umgangi – í hesum jólaumgangi?

Tað skal eg so væl siga tær:

Pie Jesus 100 ferðir ov sjáldan.

Halga nátt 100 ferðir ov sjáldan.

Gleðilig jól, Eivør, 10.000 ferðir.

Góða ferð til Svøríki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Roynt verður at lata flakavirkið í Hvalba uppaftur

**Arbeiðsmannafelagið Roynd hevur hjálpt 20-30 fólkum at fylla út umsóknarbløð til Trygdargrunnin, men haðani fæst einki oyra, so leingi virkið ikki er farið á húsagang.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Hvalba:** Einki arbeiði hevur verið á flakavirkinum í Hvalba, síðan virkið fór í gjaldssteðg fyri nøkrum mánaðum síðan.

Nú fréttist tó, at "góðir menn", bæði í Hvalba og aðrastaðni, arbeiða við eini loysn, sum kann føra til, at virkið verður latið uppaftur um ikki so langa tíð. Men enn er ein endurreising ikki í heilt "pottinum", skilst. Hvørjir persónarnir aftan fyri eina møguliga endurreisn eru, vil kelda okkara ikki siga, men bara, at hetta eru "góðir menn", og at arbeiddi verður í loyndum.

### Mistu arbeiði - og pengar

Tá ið virkið fór í gjaldssteðg, mistu eini 40-50 fólk arbeiði. Tey mistu eisini nakrar vikur í løn og skipini, sum burtur av landaðu til virkið, Steintór, Niels Pauli, Mýlingur og Brestur, mistu eisini pengar.

Arbeiðarafeløgini í Hvalba hava hjálpt eini 20-30 fólkum at fylla út umsóknarbløð til Trygdargrunnin, sum tey hava goldið pengar í, men haðani fréttist, at einki kann gjaldast úr grunninum, so leingi virkið "bara" er í gjaldssteðgi. So, fyribils fáa tey ongar pengar haðani.

Keldur innan arbeiðarafeløgini siga, at teir, sum nú arbeiða við eini loysn, hava "følt seg fyri" hjá feløgunum, og ætlanin er í øllum førum, at Arbeiðsmannafelagið Roynd verður við í endurreisingini.

– Felagið hevur í nøkur ár tikið 1% eyka frá limum sínum – júst við tíendamáli at hjálpa vinnuni á staðnum, og tað fara vit at gera, um nakað spyrst burtur úr hesum, siga keldur, Sosialurin hevur tosað við.

### Harald tann síðsti

Tað var upprunaliga vinnulívsmaðurin, Jens Norðberg, sum gekk á odda fyri at byggja hvalbingum eitt flakavirki, og tað vóru í fyrsta lagi eisini Jens og sonurin, Janus, sum lótu djúpvatnstrolararnar, Niels Paula og Steintór, byggja. Hesir hava verið dyggasti stuðulin undir rávørutilgongdini hjá virkinum í Hvalba.

Tann seinasti, sum hevði flakavirkið opið, var Harald Eirikstoft.- Fólk vóru væl nøgd við arbeiðsplássið, og fólk fingu sína løn til tíðina. Reiðarí og manning hjá Niels Paula, Steintóri, Mýlingi og Bresti, vóru væl nøgd við fiskaprísin, tí virkið yvirbjóðaði prísirnar á uppboðssøluni. Teir, sum sigla við skipunum, ið eru heimahoyrandi her, vóru eisini fegnir um at sleppa til hús, so skjótt skipini høvdu lagt til bryggju. Alt vísti seg at ganga væl, til virkið tíverri fór í gjaldssteðg og hevur verið afturlatið síðan.

Keldur, sum blaðið hevur tosað við, vænta ikki, at Harald fer at lata virkið uppaftur, hóast tað ljóðar, at hann ætlar at royna. Tey trúgva heldur, at tað verða aðrir, sum fara at gera hetta. - Men enn gongur alt fyri seg í loyndum, siga tey í Hvalba.Sum skilst, samráðast nýggju stigtakararnir við Ny Kredit í Danmark umloysnina, sum nú er upp á tal.



*Hvalbingar og aðrir arbeiða nú við eini loysn at lata flakavirkið í bygdini uppaftur, og sum skilst, ætlar Arbeiðsmannafelagið Roynd at seta pengar í virkið, um endurreisingin gerst veruleiki*

Fiskimenn:

# Vilja helst verða heima millum jól og nýggjárs

**Men tað eru ikki allir, sum sleppa tað. Nakrir reiðarar vilja altíð hava skipini útaftur beint eftir jól, og tað merkir vanliga, at menn eru burtur á nýggjárinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ikki so sjáldan møtir tú fiskimonnum, sum argast um, at reiðarin vil hava ísfiskaskipini útaftur beint eftir jól, soleiðis at manningin eftir vanligum mátistokki verður burtur á nýggjárinum.

Sum skilst, eru tað oftast teir somu reiðararnir, sum "plága" manningina á henda hátt. Flestu skipini liggja um jólini og í vikuni millum jól og nýggjárs.

Men ikki øll.

### Vilja hava frí

– Vit, sum sigla undir Føroyum, vilja meiri enn fegnir hava frí á jólum ognýggjárinum, men tá ið skipsboð koma, er einki annað at gera enn at taka klædnasekkin og fara.

Soleiðis sigur fiskimaður, sum Sosialurin hevur tosað við.

Hann heldur, at dagarnir, skipini eru úti í árinum sum fer, eru so nógvir, at tað gjørdi ikki tann stóra munin, um tey lógu bundin um høgtíðirnar.

– Manningin hevði verið glaðari, tí teir kundu notið tíðina heima saman við familjuni og annars fingið eina betri hvíld. Men hjá okkum er tað vorðin fastur táttur, at vit skulu útaftur beint eftir jól, og tað er rættiliga ótolandi. Men vit hava einki val.

Í sínari tíð, tá ið vit høvdu legudagar, var støðan ein onnur, men í dag er einki sum eitur legudagar.

### Heldur hvíld enn pengar

Fiskimaðurin vísir á, at teir sigla undir teirri skipan, at tríggjar manningar eru til tvey skip, og tað merkir, at nakrir mans kunnu halda frí millum jól og nýggjárs, meðan aðrir noyðast at verða burtur. - Hetta kann eisini skapa ein ávísan misstemning, men allir vita, hví teirnoyðast avstað aftur — og tað er ikki tí, at manningin vil tað, sigur fiskimaðurin, sum heldur hevði valt friðin og hvíldina um høgtíðirnar enn teir pengar, ein slíkur túrur gevur.



*– Vit vildu heldur valt friðin og hvíldina um høgtíðirnar enn teir pengar, ein slíkur túrur gevur, sigur fiskimaður, sum argast um, at teir noyðast útaftur beint eftir jól og tískil verða burtur á nýggjárinum*

*Savnsmynd*